## Jólakonsertir við Mpiri



Jólahýrurin verður í hæddini, tá vokalbólkurin Mpiri komandi tíðina hevur jólakonsertir í Keypmannahavn. Føroyskur, russiskur og franskur jólasangur er á skránni, sum millum annað hevur verk eftir Trónd Bogason, Per Nørgaard, Pjotr Tjajkovskij og Francis Poulenc á. Mpiri fer eisini at syngja satsir frá vælumtóktu føroysku jólafløguni, sum vokalbókurin gav út í fjør. Konsertirnar verða 7. desember kl. 16 í Bellahøj Kirke í Brønshøj, 10. desember kl. 20 í Fredens Hus í Keypmannahavn Ø og 13. desember kl. 17 í Helligaands Kirke á Strøgnum.

## Jólakonsertir í Havn og Gøtu

Sunnudagin verða jólakonsertir í Gøtu kirkju og Vesturkirkjuni. Tað eru kórini Eystanljóð og Tórshavnar Mannskór sum skipa fyri konsertunum, har bæði kórini luttaka. Við á konsertini verður Eivør Pállsdóttir, bæði sum solistur og einstaklingur. Eisini luttaka tónleikarar við fylgispæli. Hetta er aðru ferð at Eystanljóð (tá Felagskórið Gøta/Leirvík) og Tórshavnar Mannskór hava felags jólakonsert. Teir 25 sangararnir í Eystanljóð verða stjórnaðir av Petur Martin Johannesen, meðan fløguaktuella Tórshavnar Mannskór við sínum 40 sangarum verður stjórnað av Bjarna Restorff. Konsertirnar verða í Gøtu kirkju kl. 16 og í Vesturkirkjuni kl. 20.

# 2.000 russar í føroyskum sjógvi í senn



*- Stóri aktivitetur hjá russiskum svartkjaftatrolarum í føroyskum sjógvi hevur ikki bara órógvað føroysku svartkjaftaskipini, men eisini okkara garnabátar og djúpvatnstrolarar, sigur Kristian Martin Rasmussen, reiðari*

**– Eitt er, at vit hava latið so nógv av okkara skerdu svartkjakvotu til russar. Annað er, at tað er sera trongligt og órógvandi í føroyskum sjógvi, tá uppi í 28 stórir russiskir trolarar hava fiskað her í senn – við fleiri enn 2.000 fiskimonnum umborð, sigur Kristian Martin Rasmussen, reiðari og formaður í Felagnum Nótaskip**

FISKIVEIÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eftir nýggju sínámillum fiskiveiðiavtaluni millum Føroyar og Rusland, sum hevur verið nógv umrødd seinastu dagarnar, kunnu tilsamans 20 russisk svartkjaftaskip í komandi ári fiska í føroyskum sjógvi í senn.

Kristian Martin Rasmussen, reiðari, sum var við til samráðingarnar, sigur, at tað hesaferð eydnaðist at minka um talið av russiskum skipum, sum kunnu fiska í føroyskum sjógvi í senn.

- Tað hevur stundum verið rættiliga trongligt og órógvandi við so nógvum og stórum russiskum skipum í føroyskum sjógvi í senn.

Reiðarin vísir á, at onkuntíð hevur talið av russiskum trolarum verið heilt upp í 28.

- Í nýggju avtaluni ynsktu russar at sleppa at fiska við upp til 25 skipum í senn, men hetta gekk føroyska samráðingarnevndin ikki við til. Tí er talið av russiskum skipum, sum kunnu fiska svartkjaft í føroyskum sjógvi samstundis, nú avmarkað til 20.

### Órógvandi

Kristian Martin sigur, at meðan føroyingar hava havt fýra verksmiðjuskip í russiskum sjógvi í senn, hava stundum út við 2.000 russiskir fiskimenn fiskað í føroyskum sjógvi.

- Talið av fiskimonnum umborð á russisku skipunum liggur millum 60 og 100 mans, og hetta merkir, at samstundis, sum einir 1.800-2.000 russiskir fiskimenn hava kunnað fiskað í føroyskum sjógvi, hevur talið av føroyskum fiskimonnum í russiskum sjógvi verið einir 120-130.

Reiðarin sigur, at stóra talið av russiskum skipum stundum hevur verið rættiliga órógvandi.

- Jú, hesin stóri aktivitetur hevur ikki bara órógvað føroysku svartkjaftaskipini, men eisini okkara garnabátar og djúpvatnstrolarar.

Kristian Martin Rasmussen sigur seg væl skilja, at føroyingar lótu russum nógvan svartkjaft, tá nóg mikið var hjá øllum at fara eftir, samstundis sum vit tá kundu fáa sum frægast burtur úr av toski í Barentshavinum.

- Stóri trupulleikin í dag er veldugi niðurskururin í svartkjaftakvotuni. Samlaða føroyska kvotan av svartkjafti komandi ár verður minni til sjey skip, enn eitt nú Christian í Grótinum einsamallur fiskaði eitt

# Reiðari: Russar fingu ov



*- Russar fingu ov nógv í mun til, hvat vit fingu hjá teimum, sigur Kristian Martin Rasmussen, reiðari*

**- Seinastu fimm árini er Russland farið úr 34% av allari føroysku makrelkvotuni upp í 46% næsta ár, sigur Kristian Martin Rasmussen, formaður í Felagnum Nótaskip**

FISKIVEIÐIRÆTTINDI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sambært nýggju avtaluni millum Føroyar og Rusland sleppa føroysk skip at fiska meiri tosk í Barentshavinum næsta ár, og russar fáa meiri makrel frá føroyingum.

Semjan millum londini ber í sær, at Rusland fær 100.000 tons av svartkjafti frá Føroyum næsta ár, og hetta er 20.000 tons minni enn í ár. Hinvegin fáa føroyingar 1.600 tons av toski og 200 tons av hýsu aftrat í Barentshavinum.

Afturfyri niðurskurðin í svartkjaftinum, sum í fyrsta lagi stendst av stóra niðurskurðinum í heildarkvotuni av svartkjafti, fær Russland 4.100 tons aftrat av makreli í 2009.

Føroyska makrelkvotan verður 12.800 tons næsta ár, toskakvotan eystanfyri 11.900 tons og hýsukvotan 1540 tons. Kvotan av flatfiski er 900 tons og óbroytt, og rækjukvotan verður eisini hin sama, 1000 tons.